# Vikuskifti

Nr. 55 • fríggjadagur • 17. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Johanna Maria Olsen 100 ár

100 ÁR
*dagfinn olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í dag fyllir Johanna Maria Olsen, nevnd Hanne Mia Olsen, í Vági 100 ár. Í morgun savnaðust børn og vaksin við hús hennara í Vági. Skúlabørn og børn úr dagstovnum, og vaksin eisini, sungu sangin, sum NePtuN hevði gjørt og næmingar í skúlanum í Vági hava vant. Sangurin varð eisini býttur út millum tey, ið vóru komin saman, so øll mannamúgvan sang so lystiliga sangin, ið gekk til lagið um Kamferkistuna.

Skúlaorkestur spældi eisini Happy Birthday og Om Lidt er Kaffen Klar.

Hanne Mia er birg og kom í hurðina at heilsa mannamúgvuni

Fríggjadag seinnapart verður hátíðarhald í VB húsinum, har løgmaður og onnur eisini taka lut og fólk kunnu heilsa Hanne Miu á 100 ára føðingardegnum.




*Í morgun savnaðust børn og ung úr skúla og dagstovnum í Vági uttanfyri hjá Hanne Miu Olsen. Hon fyllir 100 ár í dag og børn og vaksin heiðraðu henni við nýgjørdum sangi og góðum tónleiki. Hanne Mia er birg og kom í hurðina at heilsa mannamúgvuni*

Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

## Gott veður ímorgin – men kaldari næstu dagarnar



**Líggja veðrið, sum hevur verið í nakrar dagar, er á veg burtur. Njóta tí hitastigini í vikuskiftinum, tí longu sunnukvøldið kemur kavin. Sosialurin fer nú undir nýggjan tátt, har Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um vikuskiftisveðrið**

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Veðrið næstu dagarnar verður meiri óstøðugt.

Leygardagin verður lýtt við einum 4-7 hitastigum, og heldur ikki so nógvur vindur, bert 3-8 metur um sekundi. Eisini kunnu vit rokna við nøkrum sólarglottum.

– Kanska verður okkurt æl eisini, sigur Petur Skeel Jacobsen.

Sunnudagin frískar vindurin upp á einar 10 metrar um sekundi. Eitt sindur kaldari verður eisini, og okkurt kævaæl er væntadi sunnudagin

– Høgætt við kulda er á veg, til einaferð mitt í næstu viku, sigur Petur.

Njótið tí tey tunnu klæðin,i tá tit fara túr í vikuskiftinum, tí í næstu viku mugu vit bjálva okkum í ullint klæði aftur.

